# Handilslærlingur

**Til Teymavirkið í Runavík**

**Teymavirkið P/f** í Runavík sóknast eftir handilslærlingi at byrja skjótast møguligt.

**Vit bjóða** eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi.

**Vit vænta**, at tú hevur FHS- ella HH prógv. At tú ert fyrikomandi, arbeiðssamur og fleksibul persónur, sum dugir væl at samstarva, men eisini arbeiða sjálvstøðugt. Og at tú hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men hóast tað stuttligur.

**Umsókn** við avritum av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Teymavirkinum, Boks 210, 620 Runavík, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. september 2005.

**Meira** fæst at vita við at venda sær til Maluna Nielsen á tlf. 473 000.

Teymavirkið er einasta fyritøka í Føroyum, ið framleiðir línu, teymar og togverk. Teymavirkið í Runavík, Snørisvirkið í Klaksvík og Glæman í Tórshavn eru skipshandlar, har fiskireiðskapur, trygdarútgerð, arbeiðsklæði og frítíðarklæði eru at fá. Teymavirkið hevur eisini deild við búnýti og gávum í Runavík. Í alt eru 28 fólk í starvi hjá samtakinum.

# Kunngerð um kirkjuráðsval

Hervið verður gjørt kunnugt, at kirkjuráðsval verður í Glyvra Kirkjusókn **týsdagin 8. november 2005**. Valið fer fram í Glyvra kirkju nevnda dag frá 10-12 og 16-20.

Valevnislistarnir skulu vera formanninum fyri valstýrinum, Páll Rasmussen, í hendi í seinasta lagi 11. oktober kl. 19.00. Valevnini mega í mesta lagi vera 13 og skulu minst 3 og í mesta lagi 15 veljarar sum stillarar undirskriva listan. Høvuðstreytin fyri valrætti er, at ein og hvør, sum er limum í fólkakirkjuni, og sum fyllir 18 ár í seinasta lagi valdagin 8. november 2005, hevur valrætt. Skilað verður til, at veljast skulu 7 limir.

Krossur verður settur annaðhvørt fyri listan ella fyri einum valevni á listanum.

Øll valevnini skulu geva váttan um, at tey vilja lata seg stilla upp, og hvat tey ikki sitið í kirkjuráði áður, at tey eru sinnað at undirskrivað ta váttan, sum kravd verður, áðrenn tey á fyrsta sinni kunnu taka sæti í kirkjuráðnum.

Formaðurin fyri valstýrið verður at hitta í Glyvra kirkju 10. og 11. oktober, báðar dagarnar frá kl 18.-19, annars á telefon 447744.

**Valstýrið fyri Glyvra kirkju**

# Søkt verður eftir

**námsfrøðingi til frítíðarskúlan í Trongisvági**

**Stovnslýsing:**
Frítíðarskúlin er normeraður til 24 børn í 1. og møguliga 2. og 3. flokki. Hildið verður til í høli hjá Trongisvágs skúla

**Starvið:**
Talan er um eitt námsfrøðiligt starv 25 tímar um vikuna. Arbeiðstíðin er 11.00 - 16.30. Starvið verður sett 17. oktober 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Vit vænta av tær:**
At tú hevur góð samstarvsevnir og ert álítandi.
At tú tekur ábygd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
At tú vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum.
At tú ert nærløgd/lagdur og vísir umsorgan
At tú ert kreativ/ur
At tú vísir áhuga og ynskir at mennast í arbeiðinum.

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um námsfrøðingur ikki fæst til starvið, verður hjálparfólk sett tíðaravmarkað ístaðin. Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Siri Mortensen, virkandi leiðara, á tlf. 372750.

**Umsókn:**
Saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skulu verða Frítíðarskúlanum, FO-826 Trongisvágur í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 7. oktober 2005.

Tvøroyrar Kommuna

**Tvøroyrar býráð**

# Gráur posi frá IRF

Hvørt húski í limakommununum
hevur fingið eitt rull við gráum posum
í viku 37.

Rullið skal røkka til nýtslu í eitt hálvt ár.
Stór húski fáa eitt eykarull seinni.

Gráu posarnir eru ætlaðir til
dagliga ruskið, sum skal brennast.

Rusksavnararnir taka bert gráar posar
við IRF-áskrift.

Gráir eykaposar fáast til keyps á øllum
STATOIL støðum uttanfyri Tórshavn,
FK í Fuglafirði, INN við Norðskála,
J. P. Lamhauge í Vestmanna
og FK og Myllan í Miðvági.

Víst verður annars til
IRF-kalendaranum 2005
og heimasíðuna www.irf.fo.

**IRF**

# Starv

**Sum havnameistari til Fuglafjarðar havn**

Starvið sum havnameistari við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst at seta tann 01. november 2005 ella so skjótt sum til ber eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur at hava leiðsluna av Fuglafjarðar havn, somuleiðis sum tú eisini í starvinum kemur at átaka tær uppgávur við at marknaðarføra havnina í tøttum samstarvi við havnanevndina og býráðsleiðsluna.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum navigatørur og viðkomandi førleika í enskum máli.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fær møguleika fyri at menna havnina, sum seinastu árini hevur verið í støðugum vøkstri.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fuglafjarðar býráð og Føroya Skipara- og navigatørfelag fyri havnameistarar, somuleiðis sum skrivligur sáttmáli eisini verður partanna millum um arbeiðstreytir vm.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

**Hava tygum áhuga**
so eru tygum vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin ***10. oktober 2005 kl. 15.00.***

**Fleiri upplýsningar**
fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 225111 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 211102.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 20. september 2005

**Fuglafjarðar býráð**

# HÚS TIL SØLU



**Húsini standa norðuri í Sund 57 í Kollafirði**
**Tey eru betonghús klødd við timburi, og eru bygd í uml. 1942**
**Grundøkið er uml. 665 m²**
**Nógv renovering er gjørd frá 2000 og fram, húsini hava sera gott útsýni.**

**Prísuppskot kr. 900.000,-**
**(Vera seld um hóskandi boð fæst)**

**TEL 21 16 49 / 22 76 49**